## DAGSINS MEINING

### Vinnupolitikkur og útgávur

Í álitinum um vinnupolitikk, sum hevur verið viðgjørt í Løgtinginum, verður føroyska mvg-lóggávan enn einaferð umrødd.

Niðurstøðan hjá bólkinum, sum hevur arbeitt við áltinum, er, at øll undantøk í mvg-lóggávuni skulu strikast, soleiðis at talan í framtíðini verður um sama mvg-sats á øllum vørum og tænastum.

Út frá einum búskaparligum heildarsjónarmiði er kanska eisini rætt, at ein og sami mvg-satsur verður nýttur. Búskaparliga tesan staðfestir her, at er talan um virksemi, sum ikki kann bera seg, um mvg verður álagt, so eigur hendan at tillaga seg. Ella fara fyri bakka!

Tað er tó munur á einum búskaparligum heildarsjónarmiði og einum landspolitiskum heildarsjónarmiði. Ein munur, sum millum annað hevur viðført tey undantøk, sum eru í verandi mvg-lóggávu.

Hjá bløðum og bókaútgevarum eru tað sjálvandi mvg-frítøkan á hesum virksemi, sum er ítøkiligi spurningurin. Tað var í síni tíð eitt at kalla samt løgting, sum tók undir við, at mvg-satsurin á slíkum virksemi skuldi vera 0. Ein støða, sum tók støði í mentanarliga virðinum, sum er í hesum virksemi.

Løgtingið vildi tá ikki, at eitt veikt mentanarligt øki, sum er so sera týdningarmikið fyri eitt lítið samfelag – ikki minst málsliga – skuldi fáa deyðsstoytin. Avleiðingin av eini javnsettari mvg-lóg yvir allar kambar, vildi í øllum førum verið, at rentabiliteturin í hesi vinnu, sum ikki er ov góður frammanundan, vildi verið fullkomuliga burtur.

Tí er at vóna, at tær tungtvigandi orsøkir, sum tá lógu til grundar fyri støðutakanini, framvegis verða havdar í huga, nú løgtingið viðger føroyskan vinnupolitikk sum heild. At atlit eisini verða tikin til onnur virði enn tey, sum standa í búskaparligu lærubókunum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

### Viðmerking frá Sosialinum

Vísandi til tíðindi í útvarpinum um umsókn um byggiloyvi frá Eiriki Lindenskov og eftirfylgjandi málsviðgerð, verður víst til fylgjandi:

Á sumri í 2004 sendi Eirikur Lindenskov eina umsókn til Tórshavnar Býráð um byggiloyvi. Eftir at Eirikur skilti, at málið var búgvið til støðutakan og avgreiðslu, kom tað kortini í óneyðugt langdrag. Hetta fekk Eirik Lindenskov at skriva nevndarlimunum í byggi- og býarskipanarnevndini eitt hvassorðað teldubræv við eini sera óhepnari orðing, sum útvarpið hevur drigið fram sum stórtíðindi.

Í hesum ljósinum dugir Eirikur Lindenskov at síggja, at orðini vóru betur ósøgd. Men tá hann er sannførdur um, at orðingin ikki hevur ávirkað avgerðina hjá býráðnum – soleiðis sum formaðurin í byggi- og býarskipanarnevndini eisini hevur staðfest, metir hann heldur ikki, at hon eigur at hava avleiðingar fyri hann sum blaðstjóra á Sosialinum.

Eirikur Lindenskov heldur tað verða neyðugt at undirstrika, at talan var ikki um eina hóttan, sum var ætlað at ávirka málsviðgerðina hjá Tórshavnar Býráð.

Jan Müller, ábyrdarblaðstjóri, hevur tikið frágreiðingina til eftirtektar og hevur fult álit á Eiriki Lindenskov.

**Jan Müller,**
*ábyrgdarstjóri*

**Eirikur Lindenskov,**
*blaðstjóri*

### Rættleiðing til Kim Simonsen

ÓLAVUR RASMUSSEN
í Leirum



Í sendingi Kultura mánakvøldið 20. januar hevði Kim Simonsen eitt ummæli av míni bók um Søren Kierkegaard. Ummælið var so grunt, at eg kenni meg noyddan at koma við eini rættleiðing.

Kim Simonsen segði, orðarætt citat: "Projektið hjá Ólavi er at tulka og seta fram hvat Kierkegaard sigur í einum av høvuðsverkunum, nevniliga Enten Eller."

Hetta er púra burturvið. Mín bók er ein ferð gjøgnum høvuðsverkini hjá Kierkegaard, júst tí at teir ymisku høvuðspersónarnir ganga aftur í hesum verkum. Hetta geri eg greitt longu í innganginum í bókini.

Kim Simonsen segði, orðarætt citat: "Ólavur vísir ikki hvussu Victor Danielsen brúkti Kierkegaard. Søgan um Victor Danielsen er fyri tað mesta ein pástandur."

Tað er ein sannroynd, at Victor Danielsen er fyrsti føroyingur, sum ikki bara gjørdi vart við Kierkegaard, men enntá brúkti hann í eini beinleiðis uppgerð her á landi. Í míni bók vísi egá, samstundis sum eg vísi til keldurnar, at Victor Danielsen sum ungur skrivaði ein hóp av lesarabrøvum, har hann ferð eftir ferð citerar úr Øjeblikket hjá Søren Kierkegaard. Kim Simonsen kann fara út á Landsbókasavnið og lesa Tingakross, árgangirnar 1914 – 16, har Victor Danielsen citerar brot fyri brot úr Eygnabragdinum hjá Kierkegaard.

Kim Simonsen kann venda aftur til málið, tá ið hann hevur lisið hasar árgangirnar, ti at eg vil helst kjakast við ein mann, sum hevur innlit í tí, sum hann umrøður.

PS. Eg kann eisini upplýsa, at M. S. Viðstein í dagblaðnum 7. februar 1961 og Petur Háberg í grein í 14. sept, 22. febr. 1961 báðir nevna sambandið millum Victor Danielsen og Kierkegaard. Kim Simonsen kann lesa meira um hetta í bókini hjá Zachariasi Zachariassen, Bíblian á føroyskum í hálva øld.

### Villleiðandi marknaðarføring

KÁRI P. HØJGAARD
Landpostboð
í farloyvi



**– Kallið ein spaka fyri ein spaka. Endamálið við herferðini hjá Postverkinum er at minka starvsfólkatalið, sigur Kári P. Højgaard, løgtingsmaður og landpostboð í farloyvi**

Loksins er so Postverk Føroya blivið partafelag. Sjálvsagt vóna og vænta tey flestu, at tað skal ganga partafelagnum væl, so framburður og menning verða sjónlig í virkseminum. Somuleiðis er vónin, at árliga hóttanin um hópuppsagnir er ein farin tíð, so starvsfólkini kenna tryggleika á arbeiðsplássinum og av heilum huga kunnu røkja virksemi sítt við íðni og áhuga.

Tað kennist tó hugstoytt at sita framman sjónvarpsskíggjan og líta at seinastu sjónvarpsherferðini hjá Postverkinum. Mynd sæst av einum persóni í pulshosum, sitandi við apostlunum hægst, meðan vakurt songlag boðar frá, at hóast veðrið ikki er til vildar, so skal posturin avstað. Eitt postboð sæst kvikliga koyra post í postkassar, ið eru hongdir fram við vegnum.

So langt er alt í lagi, men tá áheitanin kemur, um at hjálpa og lætta um hjá postboðnum við at seta kassan so nær vegnum sum gjørligt, so er tað ikki grundað á kærleika til starvsfólkið ella nøkur roynd at lætta um gerandisdagin hjá postboðunum, sum ein sambært lýsingina annars kann fáa kensluna av.

Ongin ivi man valda um, at tá postkassamentaliteturin hevur vunnið frama, verður stoppurið tikið fram og kannað verður eftir, hvussu nógv fleiri hús hvørt einstakt postboð kann klára afturat, tí dagliga vitjanin inn í húsini er skorin burtur og postur kann bert sendast mikudag.

Hetta er ein gongd, sum ikki slepst undan, upplýsti formaður Postfelagsins í Degi og Viku. Ivaleyst er hetta rætt, men tá ein so týðandi umlegging fer fram bert fyri at spara pening, er tað beinleiðis villleiðandi at siga, at hetta er fyri at lætta um hjá postboðunum.

Á líknandi hátt sum í fótbólti brúkar Postverkið eina kortskipan, har brúkarar fáa gul og reyð kort, um postkassin ikki verður hongdur eftir ásetingunum. Tá korthandanin er liðug, man postboðstovnurin verða minkaður við áleið 20 prosentum.

Vælsignaðir menn, nevnið ein spaka fyri ein spaka.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:**
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard
toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.